**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 18/2018: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2018-2**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Kristina Háfoss, hevur lagt málið fram 19. september 2018, og eftir 1. viðgerð 25. september, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 4. og 9. oktober 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismenninar í ávikavist fiskivinnu- og í fíggjarmálum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ruth Vang, Bárður Nielsen, Helena Dam á Neystabø, Pauli Trond Petersen og Bill Justinussen) vísur á at at við løgtingmál 15.18 uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2018, hevur ein meiriluti lagt fram uppskot til eykajáttan til 20.3.04. Landssjúkrahúsið og tí heldur sami meiriluti at játtan til landssúkrahúsið ikki eisini eigur at verða játtan í hesa eykajáttan.

Eisini vísur meirilutin á, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur fyri nevndini upplýst at játtan 21.3.01 Barnaverd ikki fer at røkka og mælir til at seta av kr. 1 mió.

Við hesum viðmerkingum setur meirilutin fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

# § 11. Heilsumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.3. Sjúkrahúsverkið** | | | |
| 20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | J: | 672.042 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

# § 12. Almannamál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **12.21.3. Barnastuðul** | | | |
| 21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin j.) | J: | 2.655 | 820 |
| | **EYJ:** | **4.273** | **-** |

Meirilutin tekur við hesum broytingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin**(Jacob Vestergaard) vísur á at bæði limir og varalimir hava luttikið saman á fundi Metingarnevndini, ið er sett sb. Kunngerð um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum økjum 2018. Ongin heimild er til hetta og tí hevur landsstýrismaðurin goldið samsýning til bæði limir og varalimir á samna fundi uttan heimild.

Utgjaldi er sb. fiskimálráðið hesi:

**Metingarnevnd 2018**

| | Tímar | fundir < 3 tímar | fundir > 5 tímar | Tímaløn | Fundar-peningur | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Formaður | 132,5 | 2 | 3 | 56.963,08 | 12.650,00 | 69.613,08 |
| Nevndarlimur | 122 | 2 | 3 | 52.449,02 | 6.325,00 | 58.774,02 |
| Nevndarlimur | 136 | 2 | 3 | 58.467,76 | 6.325,00 | 64.792,76 |
| Varalimur | 49 | 2 | 3 | 21.065,59 | 6.325,00 | 27.390,59 |
| Varalimur | 101 | 2 | 3 | 43.420,91 | 6.325,00 | 49.745,91 |
| Varalimur | 46 | 1 | 3 | 19.775,86 | 5.750,00 | 25.525,86 |
| Skrivari | 70 | | | 30.093,70 | 0 | 30.093,70 |
| Tilsamans | 656,5 | 11 | 18 | 282.235,92 | 43.700,00 | 325.935,92 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Satsir | 429,91 | 575 | 1.725 |

Við hesum viðmerkingum setur minnilutin fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

# § 5. Fiskivinnumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **5.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 15.290 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

Minnilutin tekur við hesum broytingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 9. oktober 2018**

Ruth Vang
formaður

Bárður Nielsen
næstformaður

Helena Dam á Neystabø

Kristin Michelsen

Pauli Trond Petersen

Jacob Vestergaard

Bill Justinussen